LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
Ford Sierra 2.0, árg. 88, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 372020 ella 221199

DEKK
Fýra so gott sum nýggj dekk til Ford Ka til sølu.
Tlf. 312615

BUSSUR TIL SØLU
Mercedes Benz O 309D árg. 1984, 22 pers., nýsýnaður, bíliga til sølu. Væl egnaður at umbyggja til kamping.
tlf. 421500 ella 215505

TIL SUZUKI ALTO
Er tað nakar, sum hevur ein vinstra forskerm og vinstru hurð, til ein Suzuki Alto við trimum hurðum. Helst í ljósagrønum liti, men tað er ongin treyt.
Tlf. 310055/250118 ella 262427

TIL SØLU
2 heilársdekk stødd 165/80-13. Merki Sava til sølu.
Tlf. 256900

DEKK
185/65-15 eru sum nýggj til sølu.
Tlf. 256900

MAZDA 323
árg. 86, sýnaður 12.02. Prísuppskot 2.000 kr.
Tlf. 322440

NISSAN BLUEBIRD
árg. 88 í góðum standi. Sýnaður 15. mai 2003. Prísur 5.500,- kr.
Tlf. 267147

VW JETTA
árg. 85, bíliga til sølu, nýggjum dekkum + tvey reserva, fyri 3.000. Koyrir væl.
Tlf. 267147

17'' SPORTSFELGUR
til BMW, av slagnum Alutec, bíliga til sølu. Dekkini eru 225, 17/45.
Tlf. 216690

EYKALUTIR TIL SØLU
Nógvir eykalutir til Mazda 626, árg. 84, sera bíliga til sølu.
Tlf. 257144

TIL SØLU
Ein Citroen Xsara, silvur gráur.1,9t d., árg des. 98, hevur koyrt 118000 km, í góðum standi til sølu, ring og hoyr nærri.
Tlf. 507039

DEKK
Fýra stk. á felgum 265/70 R16 passa til Mitsubishi Pajero árg. 88, 4.500 kr.
Tlf. 213067

OZ-ALUFELGUR
Spildur nýggjar OZ-alufelgur ið passa til Peugeot 206, 306 og 307, 14'' til sølu. Prísur 3.500 kr.
Tlf. 254786

NISSAN SUNNY
Nissan Sunny 1.6 SLX frá 1989 til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 321669 e-mail: alh@kallnet.fo

DEKK Á FELGUM
til sølu 195/50 R15 eru næstan óbrúkt, bíliga til sølu.
Tlf. 506077

BILAR TIL SØLU
Svartur Hyundai Sonata executive GLS, árg. 2002. Bilurin hevur c-lás, klima-anlegg, cd-anlegg, mahogny interiør, 17'' sportsfelgur við lágprofil dekkum, senkaður. Hevur koyrt 41.000 km. Ljósabláur Hyundai Trajet Pro.van, árg. 2002, cd-anlegg við 10 box, hevur koyrt 30.300 km.
Tlf. 229008 ella 226455

FORD ESCORT
árg. 89 til sølu fyri 5.000,- (hevur nr. plátur), góð summardekk á alufelgum.
Tlf. 317964 ella 507880

VW JETTA
VW Jetta árg. 87 til sølu, er í hampuligum standi – koyrir hvønn dag. 8.000 kr. Tangin er fullur.
Tlf. 261576

ELLISAKFAR TIL SØLU
Ein Volvo Amazon árg. 65, koyrir væl, men rustur skal viðgerast. Hevur nr. plátur.
Tlf. 252072

TOYOTA COROLLA
til sølu um eykalutir. Árg. 87 (nýlakeraður - hvítur).
Tlf. 213571

TIL SØLU
Ford Escort til sølu um eykalutir, árg. 90.
Tlf. 213571

TIL SØLU
Ein Toyota Corolla stationcar til sølu fyri 20.000,- kr.
Tlf. 319964 og 252901

MITSUBISHI COLT
Árg. 87, nýsýnaður, til sølu fyri 5.000,- kr.
Tlf. 213446

HEVUR NAKAR
ein Opel Ascona frá 86-87, ið kann nýtast um eykalutir at selja mær?
Ring 22 30 12 - Sofus

MAZDA 626 2.0GC
frá 86 til sølu, anlegg og 15" sportfelgur kunnu fylgja við + nógvir eykadeilir. Bilurin koyrir vel og hevur plátur.
Tlf. 506407

KIA SEPHIA 1.5i
árg. 97 til sølu um hóskandi boð fæst.
Ring 312608 ella 255028

EYKALUTIR
til Mitsubishi Pajero, setur aftan, Dynamo 4, 15" felgur, forlyktir og hjelmur til sølu.
Tlf. 227922

EYKALUTIR
til Toyota Carina At-St 171, árg. 88-91 til sølu.
Tlf. 227922

TIL SØLU
Campingvognur frá 1988 í góðum standi til sølu.
Tlf. 422228 ella 251162

DEKK TIL OPEL ASCONA
5 stk. 13" summardekk á felgum og 4 eyka summardekk til solu fyri 800 kr. Dekkini passa til Opel Ascona. Eisini eru 4 felgur til Deawoo Leganza til sølu fyri 100 kr. stk,. Ring
315210 ella 213835

TIL SØLU
Ein Toyota Carina E St. Car, árg. 96, koyrt 120.000 km., hevur sleipikrók, nýggj summardekk og eyka pikadekk á felgum.
Tlf. 328083

TIL SØLU
Mitsubishi Strada 4x4, 1 ár, koyrt 11.000 km. til sølu.
Tlf. 221168

Amboð

PLÁTUSAKSUR
2 m. klippilongd til sølu. Áhugað ringið
tlf. 217461 ella 220353

PLENUKLIPPARI
við uppladara til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 310215

TIL SØLU
Luftkompressari, El sveisiapparat, Honda industri motor 5,5 HK, dreygibonkur til træ og stál, borimaskina og onnur amboð.
Tlf. 442190

KOMPRESSARAR
og boriútgerð til grundstykkir o.a. fæst til leigu. Spreingievni er á goymslu.
Kaj Andreasen & Co. tlf. 315600

TIL KEYPS OG LEIGU
Arbeiðsskúrar fáast til keyps og leigu.
Kaj Andreasen & Co. tlf. 315600

Arbeiði

SØLUFÓLK
Søkt verður eftir sølufólki til telefonsølu.Góð løn til tann rætta persónin.
507464 Yrkadagar millum 17 og 19

AUPAIR I BRUXELLES
august 2003–august 2004.
Børnevant, ansvarsbevidst pige søges til hjælp i det daglige af dansk ægtepar med 3 små drenge. Yderligere oplysninger tlf. 0032 2772 0837 eller
email: cirkus.krogh@brutele.be

AU-PAIR
Til dansk-australsk familie i Danmark søges en au pair pige fra d. 21 juli 2003. Vi er et ægtepar, Stine på 35 og Steve på 40 år, med 2 børn, May 6 år og Johannes 8 mån., fulddtidsarbejdende, Steve som universitetslektor, Stine som forsker, bosiddende i Værløse nord for København (30 minutter med tog til centrum). En glad og afslappet familie. Du skal passe Johannes i dagtimerne, hjælpe med rengøring, vask og strygning og hjælpe med indkøb.
Løn og arbejdstid: Arbejdstiden er 40 timer om ugen og lønnen 825 kr. om ugen (som "Mothers help" hos "www.aupairinternational.dk"). Der er intet arbejde om aftenen eller i week end'en, med mindre det er særligt aftalt og kun mod særskilt timebetaling.
Steve har en del rejseaktivitet i forbindelse med sit arbejde, sammenlagt ca. 2 måneder om året.
Du får eget pænt værelse (24 kvm), lejlighed til at følge kurser, dyrke sport og andre kulturelle aktiviteter m.v. og stilling som et medlem af familien.
Du er meget welkommen til at ringe til vores tidligere au pair, Jóna (211585), som kan fortælle dig mere om os. Nærmere oplysninger fås hos os på
telefon 0045 44644161.

RØSK ÁLÍTANDI KVINNA
søkist skjótast til skiftandi arbeiðstíðir í juni, juli og august.
tlf. 221379

AU PAIR
Føroysk hjún í London við 2 dreingjum 7 og 6 ár, umframt nýføðing í september, søkja au pair, frá hálvum august, at hjálpa til við m.a.: At fylgja børnum til og frá skúla, og vimiskum húsligum uppgávum. Ert tú álítandi, fryntlig og góð við børn, so ring og hoyr nærri. Annika. Fartlf. 0044 7770273213.
Tlf. 0044 2089464888

HEIMASÍDUSMÍÐ
Tilboð ynskist at dagføra heimasíðu okkara www.craft.fo Vinarliga ring 319629
Føroya Heimavirkisfelag

Barnaansing

EIN
9 1/2 ára gomul genta í Tórshavn ætlar sær at vera barnagenta. Ring eftir kl. 14.00.
Tlf. 265778

Barnaútgerð

SIMO BARNAVOGNUR
Lift, puslitasku og flugunet, sær út sum nýggjur. Til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 448573

COMBIVOGNUR TIL SØLU
Grønur combivognur við lift, koyriposa og regnslagið til sølu, prísuppskot 2.500 kr.
Tlf. 448171/ 255108

HOKUS-POKUS STÓLUR
til sølu fyri 400,-
Tlf. 253845

TIL SØLU
Ein 0 - 13 kg myrkabláur bilbarnastólur við kalesju,til sølu fyri 600 kr. Er sum nýggjur.
Tlf. 224180

KOYRISTÓLUR
av merkinum Scandia, kromstell, myrkablátt betrekk, metalkurv undir, eitt lambaskinn, myrkablátt regnslag, myrkablá parasol + myrkablátt net, selist alt samlað fyri 1.700 kr.
Tlf. 322850

BILSTÓLUR TIL SØLU
Renault (bebe-confort) 0-13 kg. til sølu fyri 500,- Nýprísur 950,- kr. sum nýggjur.
Tlf. 310215

RIMASONG
við madrassu til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 263522 ella 332982

TREMMUSONG YNSKIST
Tremmusong í góðum standi ynskist til keyps.
Tlf. 722203 ella 422203

MYRKABLÁUR SIMO BARNAVOGNUR
við tilhoyrandi lyft til solu fyri 2.500,- kr. Vognurin er vind- og vatntættur og hevur 2 bremsur (aftan og framman). Ring
Tlf. 321430

BARNAVOGNUR YNSKIST
til keyps. ringi gerandisdagar millum kl. 9.00-15.00
Tlf. 316680

TIL SØLU
Ein myrkabláur combi tvíburavognur við lyftum til solu fyri 3.500 kr. Ein rimasong til solu fyri 350 ,- kr. og ein barnaalarmur til solu fyri 700,- kr.
Tlf. 448554 ella 266338

Bátaútgerð

GLASTREVJABÁTUR TIL SØLU
24 ft. umbygdur í 1999 til fiskarí, við 100 HK Volvo Penta Diesel, 2 drev, sera sjógóður, ferð uml. 20 mil, selist fyri 195.000,- kr.
Tlf. 0045 36706483

NÝTT FRYSTARÍ
Til frystirúm 30 kubikmetrar, frystir ÷20°. Kann m.a. nýtast til stampagoymslu, til solu.
Tlf. 217220

SPEEDBÁTUR TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er ein speedbátur - jolla úr glastrevjum - og tilhoyrandi vognur, til solu.
Tlf. 50 61 18

BÁTUR TIL SØLU
Gamalt 10-mannafar uttan fiskiloyvi. Volvo Penta 36 hk og ein Leyland 30 hk fylgja við.
Tlf. 213342

BÁTAMOTORAR TIL SØLU
Valmet 110 HK í góðum standi.
Tlf. 742014 ella 212252

Bingo

STÓRT MAT- OG BOMMTOMBOLA
verður í Róðrarneystinum á Argjum 14. juni kl. 14. Tvey lomb til heystar verða burturlutað. Drigið verður kl. 15.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

BINGO
verður í Stórhúshøll leygardagin 7. juni kl. 19.30.
JF Flogbóltur

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 17. juni kl 19. 12 plátur 100 kr Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000,- kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 5. juni kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

BINGO
Norðoya Sýsla dró tann 15. mai 2003 í lutakasti um ferðina við Norrønu. Vinnarin gjørdist E. M. Petersen, Klaksvík.
Bygdafelagið Báran í Árnafirði

Bøkur

LEKSIKON
14 bind av nordisk konversations leksikon til solu.
Tlf. 270427 ella 312981

Burturm. /funnið

MYNSTRUT BARNATROYGGJA
Hevur nakar sæð eina mynstruta troyggju, hon er ljósagrá og ljósamorreyð úr føroyskum tógvi, opin, stødd uml. 6 til 7 ár? Ringið vinaliga á
tlf. 31 84 64 ella 31 16 92, Eva

BURTURMIST
Ein grá Siemens 35 fartelefon við myrkabláa tasku er burturmist onkustaðni í miðbýnum fríggjakvøldið 30. mai.
Finnarin bidist ringja til 515091

HÁLSPRÝÐI
við útskornum andliti í horni og leðurbandi ígjognum funnið í Hoyvík. Tann, ið heldur seg eiga hetta, kann ringja á
tlf. 310592

Býli

MAMMA
við 2 børnum ynskir íbúð/hús til leigu í Klaksvík frá 1. aug.
Tlf. 258052

SETHÚS Í VATNSOYRUM TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst eru sethús, matr. nr. 409 í Vatnsoyrum, til sølu
Tlf. 506118

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12^{00}, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorvgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frimerki

Í SANDOYNNA AT FERÐAST
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum í Skopun til leigu. Húsini eru eisini vælegnaði til bólkar. Nærri frættist á
Tlf. 361061 ella 361334

ÍBÚÐ TIL FRAMLEIGU Í SUMMAR
Deilig barnavinarlig íbúð til framleigu í summar, frá juni til august. 1500 kr. um vikuna. 6 soviplass, deilig sólrík altan. Er í barnavinarligum umhvørvi.
Ring á 314708

KAMAR Í KBH
Kamar (16 fermetrar) til leigu til lesandi í KBH. Nær við Amager Sentrið. Atgongd til køk, bað og vaskimaskinu. 2.500,- kr. um mán. Ring um kvøldið
Tlf. + 32963698 ella + 21402428

HÚS Í FUGLAFIRÐI
Um hóskandi boð fæst, eru hús til sølu.
Tlf. 444688 ella 212088

ÍBÚÐ TIL LEIGU
67 fermetrar, 2 kømur, wc, kokur og stova í einum, sera gott útsýni, til leigu í Tórshavn frá 1. august. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1600

HEY HEY
Vit eru 2 fittar gentur sum sóknast eftir eini íbúð í Havn fyri sámuligan pris. Vit fara væl um og gjalda til tíðina. So, um tú hevur eina so vinarliga ring.
Tlf. 220949

ÍBÚÐ Í TAASTRUP
íbúð í Taastrup til leigu frá 12. juli til og við 4. august. 70 kvm. mitt í býnum við øllum hentleikum, liggur 2 minuttir frá s-tok.
Ring 29603520

YNSKIST
Kamar ella íbúð í høvuðstaðarøkinum til leigu ella framleigu í juli og august. Eg eri 29 ára gamal, lesandi uttanlands og skal arbeiða í Føroyum í summar. Royki ikki, og fari væl um. Havi eitt kamar tætt við Keypmannahavn, so møguleiki er eisini fyri eini umbýtingaravtalu.
Tlf. 004522711124 ella 004577424594

SUMMARFRÍ Í KBH.
Á tí hugnaligu Islands Brygge er ein íbúð til leigu frá 23. juni til 1. august. Svimjihylur er beint við og bert 5 min. eru til Tivoli og Strøget. Minsta leigumál: 1 vika. Nærri fæst at vita á
tlf. 0045 32549391

SØKIST
Íbúð fyri sámuligan pris í Havn. Royki og drekki ikki og gjaldi til tíðina. Havi 1 barn.
Tlf. 227096

ÍBÚÐ YNSKIST
Kvinna við 3 børnum ynskir íbúð í Tórshavn, helst vesturbýnum. Farið væl um og gjaldi rættstundis.
Tlf. 229900

FRAMLEIGA YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur eina íbúð at framleiga okkum á kollegiinum "Solbakken" í Keypmannahavn? Vit eru eitt par, annar undir lesna, við tveimum børnum.
Tlf. 20698040

ÍBÚÐ Á EYSTYUROYARØKINUM
Eitt par leitar eftir eini íbúð í Eysturoyðarøkinum.Fryntlig og gjalda til tíðina.
Tlf. 263425

ÍBÚÐ Í ÁRHUS
Vit fara heim til Føroya í summar. Tí er okkara 2-rúms íbúð til leigu frá 1. juli til síðst í august. Íbúðin liggur í friðarligum umhvørvi í miðbýnum í Árhus, og umframt allar vanligar hentleikar er altan og vaskikjallari til íbúðina. Eisini eru parkeringsviðurskiftini framar. Prísur: 1500,- um vikuna ella 5000,- um mánaðin, alt íroknað.
Tlf. 0045 22937148

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par við einum barni, sum søkja íbúð í Eysturoynni skjótast gjørligt. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 269329

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH. Í SUMMAR
Hevur nakar eina íbúð til leigu til tvey fólk í 14 dagar frá uml. 12. juni?
Tlf. 313003

KAMAR TIL LEIGU
miðskeiðis í Reykjavík í juni mánað. Ring til Ingu Rósu.
Tlf. 0035 45621737 ella 8641736

EITT RÚMS ÍBÚÐ
26 fermetrar við køki til leigu í Holte, vikurnar 24-31 stutt frá grønum øki, 30 min. frá Keypmannahavn kostn.: 1.000 kr. pr. viku.
Tlf. +45 77429925 ella +45 22905405

KAMAR TIL LEIGU
í vesturbýnum,við atgongd til thekøk, bað og vaskimaskinu. Vinarliga
ring 314765 eftir kl.18

VIT SØKJA
onkran í Tórshavn ella har á leið, sum vil býta íbúð við okkum frá umleið 17. - 27. juli. Vit búgva á Oyrasundskollegiinum í Keypmannahavn.
Ring tlf. 251199 eftir kl. 17

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
í Álborg/Norðe Sundby. Par við 5 ára gomlum barni søkir íbúð/hús í Álborg umráðnum skjótast gjørligt ella frá 1. aug.
Tlf. 0045 20106975 ella 228558

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN
Jeg er en 23 árig pige der søger en lejlighed her i Havn. Har du/I en lejlighed, som I gerne vil leje ud til en pige, der ikke ryger eller drikker og som har arbejde, så ring venligst på nedenstående tlf. nummer efter kl. 16.00.
Tlf. 261622

SUMMARHÚS TIL LEIGU
Húsini liggja uttan fyri Skopun í barnavinarligum umhvørvi – brenniovnur er til varma, oljulampur til ljós og gass at matgera á. Ring og hoyr meira.
Tlf. 267539

UNGUR MAÐUR
ikki rokjari, søkir kamar ella lítla íbúð í Keypmannahavn í sambandi við summarskeið á DTU í tíðarskeiðinum 01.07.03 til 15.08.03.
Tlf. 312037 eftir kl. 16

2-RÚMSÍBÚÐ Í KBH/AMAGER
Fult møblerað v/altan, til leigu frá juni/aug. 2003 fyri 1.300.- kr. um vikuna. Liggur tætt við strond og gott busssamband.
Tlf. 0045 26536288

LÍÐIN – TVØROYRI
frá 1. juli eru hús til leigu vikuskifti og styttri tíðarskeið, allir vanligir hentleikar eru.
Tlf. 222684

HYGG HER
Vit eru tvey systkin m og (k + barn), bæði lesandi, søkja eina íbúð í Havn frá 1. aug. Roykja ikki. Gjalda til tíðina.
Tlf. 361134

HÚS Í DANMARK
Er tað ein familja í Eysturoynni sum vil býta um hús við okkum frá 28. juni til 12. juli. Vit búgva í rúmligum húsið í barnavinarligum umhvørvi í Taastrup. Nær við innkeypscentur og tokstað.
Tlf. 0045 43520242, mail: jess.edna@mail.dk

FERIE I KØBENHAVN
Lejlighed, 2 værelser i roligt område. 5 min. med s-tog til Københavns Hovedbanegård og Tivoli. Gode busforbindelser. 4 sovepladser. Udlejes i juli. pris: 5.000,- kr.
Tlf: +4522460404. E-mail: annettevogel@get2net.dk

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par, bæði lesandi - fast starv søkja eftir einari íbúð í høvuðstaðarøkinum. Vit eru rólig, fara væl um, roykja og drekka ikki. skrivast kann til soffur@hotmail.com ella ringjast kann til
tlf. 223012

HÚS TIL LEIGU
Eldri hús í miðbýnum í Havn eru til leigu frá 1. august. Húsini eru í góðum standi, hava hjall og stóran garð rundanum. Kunnu leigast møblerað. Kostnaður 8.000 kr uttan ljós og hita.
Tlf. +351 233422993

ÍBÚÐ Á AMAGER TIL SØLU
2 ver. íbúð til sølu. Meira fæst at vita á
www.annaogmichael.dk

KAMAR ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
í Tórshavn, Argjum, Hoyvík ella har áleið. Tað hevði verið sera deiligt um vit kundu framleiga eitt kamar ella eina íbúð til 18. aug. Vit eru eitt ungt friðarligt par fyrst í tjúgunum.
Tlf. 220255

ÍBÚÐ SØKIST SKJÓTAST GJØRLIGT
Einligur sjómaður mitt í 30-unum, søkir íbúð í Tærorshavn. Eri friðarligur og fari væl um. Leiga um mán. max. 3.500 kr.
Tlf. 215566

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
Íbúð til leigu í Havn. Ringi á
Tlf. 517244

LEIGA AV ÍBÚÐ/HÚSUM
í Havnaumráðnum. Vit eru eitt ungt par, bæði undir útbúgving - og hava fast starv, ið søkja eftir einar íbúði Havn. Eru rólig, fara væl um og roykja ikki. Skriva til : soffur@hotmail.com
ella ring 223012

LEJLIGHED SØGES I HAVN!
Jeg er en 19 år gammel pige som søger en lejlighed i Havn fra 1. august eller før. Ryger og drikker ikke.
Tlf: +45 40583939

AUSTRALIA
Droymir tú um at sleppa at uppliva Australia? Nú hevur tú møguleikan. Vit hava eini hús til leigu í Perth, West Australia, frá 15. sept. til 1. febr. Hetta er sera góð árstíð við várinum í sept, har hitin liggur um 25-30 stig, og hásumrinum í jan./febr. við hitastigum upp til 35-40. Hevur hetta tín áhuga og tú/tit kundu hugsað tykkum at vita meira, so setið tykkum í samband við okkum á e-mail:
LailaJan@bigpond.com, ella ringið 0061 8 94588912.
Okkara postadressa er:
Laila & Jan Dam,
19 JACCARD WAY,
6147 LYNWOOD, PERTH,
WESTERN AUSTRALIA
LailaJan@bigpond.com

Dansur

GÓÐUR DANSUR
við Tinganest úr Vágum verður í Róðrarneystinum á Argjum leygarkvøldið 14. juni. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-Stuðlar

Dýr

AKVARIUM TIL SØLU
Stórir fiskar og eitt 250 l. akvarium til sølu. Prísynski 1.500 kr.
Tlf. 310750 ella 210810

KETTLINGAR
4 avbera fittir kettlingar verða latnir djóravinum, 3 hvítir og 1 myrkabrúnur. Teir eru uml. 7 vikur og kunnu avheintast beinanvegin.
Tlf. 449035 ella 261346

AKVARIUM
umleið 50 lítur við ljósi, pumpu, hitalikami, iltapparati, grúsi, steinum og plantum til solu fyri 700,00 kr.
Tlf. 314103

KETTLINGAR
4 avbera fittir kettlingar verða latnir djóravinum, 3 hvítir og 1 myrkabrúnur. Teir eru uml. 7 vikur og kunnu avheintast beinanvegin.
Tlf. 449035, 261346

HUNDAHVØLPUR
Ein fittur brúnur hundahvølpur (tík) undan lítlari tík, fæst bert til djóravinir.
Tlf. 316639

TIL SØLU
1 angora kanin og 1 dvørga kanin.
Tlf. 448935

KETTLINGUR
Eg er ein 8 vikur gamal kritahvítur frensur. Eg eri so fittur og reinligur, og vil gjarna hava eitt heim. Tit kunnu koma eftir mær beinanvegin.
Tlf. 316155/254406

TVEIR FITTIR KETTLINGAR
fáast við at ringja
tlf. 376436 ella 257803

SERA FITTUR HUNDAHVØLPUR
(hann) verður latin til djóravin. Verður miðalstórur.
Tlf. 221013 eftir kl. 18

TAMUR KETTLINGUR
funnin 29. mai við Sundsvegin/Berjabrekku. Er svartur v/ hvitum labbum, hvít undir búkinum, hvitan plett undir nøsini.
Ring 262467, Rúna

MARSVÍNUNGAR
Fýra mega fittar marsvínhonir verða latnar djóravinum um tvær vikur. Er hetta nakað fyri teg, so ring beinanvegin.
Tlf. 258367

KETTA
Kettumamma við einum kettlingi verður latin vegna serligar umstøður. Er sera rólig.
Tlf. 507550

MARSVÍN TIL SØLU
Marsvínaungar til sølu fyri 40 kr. Bert til djóravin.
Tlf. 257144

HUNDAHVØLPAR
7 sera fittir hundahvølpar, collie/labrador, til sølu fyri 500 kr. stk. Áhugað kunnu ringja
tlf. 449479 ella 219479

AKVARIUM TIL SØLU
Eitt 28 l. akvarium við pumpu til sølu fyri 250 kr. Eitt sekskantað 17 l. akvarium við ljósi og pumpu til sølu fyri 500 kr. Varmalikam til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 317715

ER TAÐ NAKAR
Í Havn, sum hevur ein fittan hundahvølp at lata mær? Hann fer at fáa eitt gott heim.
Ring 506929 ella 268166

KETTLINGAR
Vit hava tríggjar ordiliga fittar kettlingar at lata djóravini.
Tlf. 317367

NAKRAR BALLIR
av sera góðum hoyggi eru til sølu. Ballirnar eru pakkaðar í plastik vekt ca. 40 kg. pr. stk.
Tlf. 374555

KETTLINGUR
Sjáldsama fittur frensur, hvítur við svørtum stórum blettum omaná, 10 vikur gamal, kann fáast við at ringja
tlf. 313255 - 223255

HUNDAHVØLPUR YNSKIST
av lítlum slag, helst tík.
Tlf. 228458

KANIN
Ein hvít angorakanin kann latast djóravini.
Tlf. 457941

HUNDAHVØLPAR
Tveir sera fittir hundahvølpar - mamman ektað silkipuddel, vórðu lagdir 19. april – verða latnir til djóravin.
Tlf. 455017 ella 457941

Fundir

AÐALFUNDUR
Foreldrafelagið »Hoyrnin« hevur aðalfund hósdagin tann 19. juni kl. 19 í Deyvahúsinum. Skrá:
1) Val av orðstýrara.
2) Formaðurin greiðir frá farna árinum.
3) Kassameistarin leggur fram roknskap til góðkenningar.
4) Ásetan av limagjaldi.
5) Innkomin mál.
6) Val av nevnd og tiltakslimi.
7) Val av grannskoðara.
8) Ymiskt.
Nevndin

AÐALFUNDUR
Vestmanna Vinnulívsfelag hevur aðalfund fyri 2002 týsdagin 1. juli 2003 kl. 19.00 í Vestmanna skúla. Skrá sambært viðtøkum felagsins.
Nevndin

FRÁ H71
Aðalfundur verður í Hoyvíkar skúla 19. juni 2003, kl. 19.00.
Nevndin

FRÁ GØTU ÍTRÓTTARFELAG
Ársaðalfundurin hjá felagnum verður í Ítróttarhúsinum hóskvøldið 12. juni kl. 20.30.
Nevndin

Húsarhaldstól

ZANUSSI VASKIMASKINA
Hálvt ára gomul Zanussi F1202 V til sølu fyri 3.600 kr. Maskinan er lítið brúkt og í góðum standi. Verður seld vegna flyting.
Tlf. 267147

TIL SØLU
Vaskimaskina, køliskáp, frystiboks, Kenwood Chef mixari og onnur húsarhaldstól.
Tlf. 442190

Innbúgv

MØBLASETT TIL SØLU
Ein stór hornasofa, eitt sofaborð, eitt telefonborð og tvær hillar. Merki Christian IV
Tlf. 310750 ella 210810

SOFUR TIL SØLU
Tvær brúnar leðursoftur við bók kantum til sølu. Onnur trýmans sofa og hin tvey mans sofa.
Tlf. 310750 ella 210810

TIL SØLU
Tvær briksir við pútum til sølu, 500 kr. stk.
Tlf. 315123

SOVISOFA TIL SØLU
3 ára gomul, væl hildin grá sovisofa við øllum til sølu fyri einans 2000 kr.
Tlf. 260590

TIL SØLU
Box song við boylabeinum og toppmadrassu 140 x 200 til sølu fyri 1200 kr. og hvítur reolveggur 800 kr.
Tlf. 319371 og 219371

TIL SØLU
Sofaborð v/ glasplátu, 400 kr. Kommoda og spegl, 200 kr. Tveir stovustólar, 400 kr. Hvítur reolveggur v/ glashurðum, 4 m langur, 1.500 kr.
Tlf. 317055 - 217055

Lutaseðlar

UNGDÓMSORKESTRIÐ HJÁ TÓRSHAVNAR MUSIKKSKÚLA
Hesi hava vunnið:
Nr. 1) 684,
Nr. 2) 3383,
Nr. 3) 2262,
Nr. 4) 3979,
Nr. 5) 1695,
Nr. 6) 2357,
Nr. 7) 1799.
Vinningarnir fáast við at ringja á tlf.nr. 318890. Takk fyri stuðulin
Ungdómsorkestrið hjá Tórshavnar Musikkskúla

LUTASEÐLAR HJÁ EB/STREYMI
Lutaseðli til frama fyri Felagsdeildina EB/Streymur. Hesi hava vunnið:
1. 2023, 2. 5847, 3. 6474, 4. 2839, 5. 1629, 6. 0471, 7. 9077, 8. 8211, 9. 3395, 10. 5771, 11. 6859, 12. 4500, 13. 8480, 14. 1787, 15. 4734, 16. 4499.
Takk fyri stuðulin. Vinningarnir fáast við at ringja á
Tlf. 423346

TVØROYRAR BÓLTFELAG - UNGDÓMSDEILDIN
Vinnarar av okkara lutasølu: Harmonikutúr við Norrønu nr. 29335, Sodavatnskassi nr. 33299, Sodavatnskassi nr. 0327. Takk fyri stuðulin.
Tvaroyrar Bóltfelag

10. FL. Í VESTMANNA SKÚLA
1) 2809, 2) 1532, 3) 2162, 4) 2289, 5) 3859, 6) 2021, 7) 1615, 8) 3202, 9) 2646, 10) 2184, 11) 1487, 12) 1358, 13) 3611, 14) 3121, 15) 3760, 16) 2320.
Vinningarnir fáast við at ringja tlf. 424476 ella 211476. Takk fyri stuðulin.
10. fl. í Vestmanna Skúla

GÍ LUTASEÐLAR
Av tí at ov lítið av vatni var í ánni í Norðragotu 30 mai, tá »Sprekaraftingin« skuldi verða, verður hetta ístaðin sunnudagin 15. juni eftir dystin GÍ-VB. Hinir vinningarnir verða eisini drignir tá og lýst verður í bleðunum hvørji nr. hava vunnið. Um tað heldur ikki riggar hendan dagin, verður »Sprekaraftingin« so skjótt umstøðurnar eru til tað.
GÍ

DJÓRADAGAR 2003
Hesi vunni:
Mykjukapping, teigur 291, Krov, atgongumerki nr. 246, Gás, atgongumerki nr. 286. Vinarliga sigi frá á
Tlf. 219098

LUTASEÐLAR TIL FRAMA FYRI KFUM Í HAVN
Hesir lutir eru ikki avheintaðir:
2. vinningur nr. 5542,
5. vinningur nr. 6583,
7. vinningur nr. 6511,
8. vinningur nr. 1971,
9. vinningur nr. 4139,
10. vinningur nr. 4170.
Vinningarnir fáast við at ringja
Tlf. 314139, 311928, 311824 og 211824

7. FLOKKUR VIÐ NORÐSKÁLA
Lutaseðli hjá 7. flokki við Norðskála-Oyrar skúla. Drigið varð 25. mai 2003.
1) Nr. 1242 2) Nr. 1095 3) Nr. 1433
4) Nr. 1050 5) Nr. 1102 6) Nr. 1303
7) Nr. 1276 8) Nr. 1424 9) Nr. 1018
10) Nr. 1307.
Lutir, sum ikki eru heintaðir innan 6. juni fella aftur til flokkin.
Tel. 422447

Pløgg

TIL SØLU
Lítið brúkt troyggja til føroyska kvinnubúnan str. XL.
Tlf. 448269

TIL FØROYSK KLÆÐI
Hondbroderað fyriklæði og turriklæði við kýsa til sølu. Stødd 3-5 og 10 ár. Damutroyggja stødd M.
Tlf. 313765

YNSKIST TIL KEYPS
Er tað nakar, sum kann selja mær turriklæði og fyriklæði til føroyska kvinnubúnan. Vinarliga ring
tlf. 213083 eftir kl. 18

FØR. DREINGJABÚNAR
std. 3-4 ár og 7-8 ár ynskjast til keyps.
Tlf. 313375

TIL SØLU